## Eitt andaktstykki um dagin

**Heimamissiónsforlagið hevur nú givið væl umtóktu andaktsbókina Dagligt breyð út í føroyskari týðing**

HMF

Í bókini Dagligt Breyð er eitt andaktstykki til hvønn dag í árinum, og kann hon tí verða ein góð hjálp til tey, ið ynskja at byrja dagin við einum Guds orði.

Dagligt Breyð er umsett til fleiri ymisk mál, og hevur verið nógv nýtt í londunum uttanum okkum. Henry D. Joensen, lærari, og Johs. Mortensen, trúboðari, hava týtt hana til føroyskt. Finleif Mortensen hevur teknað permumyndina, og myndirnar inni í bókini.

Carl Fr. er víða kendur fyri sínar mongu bøkur, og ein av hansara kendastu er júst henda andaktsbókin. Ein onnur kend og nógv brúkt bók, er bókin Eg trúgvi, sum eisini er týdd til føroyskt.

Carl Fr. Wisløff livdi eitt langt lív. Hann andaðist í fjør, 95 ára gamal. Carl Fr. var bæði prestur, rektari og professari, og hann verður roknaður sum ein av týdningarmestu persónunum innan kirkjulívið - og serliga innan kirkjuligu leikmansrørsluna - í Norra í 20. øld. Wisløff hevði stóra ávirkan á kristiliga leikmansarbeiðið í Norðurlondum og eisini víða út um heim.

Bøkurnar frá Heimamissiónsforlagnum kunnu keypast umvegis heimasíðuna www.hmf.fo , tlf. 470000, fax 470001 og í bókhandlunum runt landið.

ave

# Ongi jól uttan Jólaboð

**Ongi jól í Føroyum uttan hugnaligu Jólaboð, sum í ár hava 65 ár á baki. Jólaboð 2005 frá Bókadeild KFUMs er sjálvandi longu komið, og hesar dagarnar roynir forlagið seg eisini við eini heilt nýggjari útgávu um Robinson Krusoe**

Bókadeild KFUMs

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Útgávuvirksemið hjá KFUM byrjaði longu í 1940, tá fyrsta Jólaboð kom út. Undir krígnum var nevniliga sera smátt við føroyskum útgávum, og tí hildu stigtakarnir tað vera vert at royna seg við einum savni av søgum og siðsøguligum tilfari, hóast útlitini fyri, at útgávan fór at bera seg, ikki vóru av teimum bestu.



*Fyrr í ár kundi Guttorm Zachariassen halda sín 25 ára starvsdag sum ritstjóri á Jólaboð, sum Bókadeild KFUMs gevur út*

### Jólaboð 2005

Í Jólaboð í ár eru siðsøguligar greinir, yrkingar og søgur bæði upprunaligar og týddar.

Inngangin Jólini - sólstøða mannahjartans hevur Meinhard Bjartalíð skrivað.

Í søguni Barnhús eftir John S. Myllhamar hoyra vit um fimm ára gomlu gentuna Súsonnu, sum at enda verður ein eingil.

Í søguni Gáloysni, sum Sigvald Kristiansen hevur skrivað, hoyra vit um drongin Hanus, sum so fegin vil hava eitt heimalamb, og hvussu hetta kom í lag.

Og í søguni Tað ævilanga listarverkið fer Jógvan Ingvard Olsen við okkum inn í ein egningarskúr, har vit uppliva Kristian, sum m.a. filosoferar um agnið, og abbadóttrina, sum kemur við pannukøkum.

Umframt týðingar eru eisini tríggir sálmar, sum Kjartan Stakksund hevur yrkt, í Jólaboð hesuferð

Í siðsøguliga partinum undir heitinum Halga stund, ber signing og frið sigur Heini F. Petersen frá Jóhannesi Olsen og Sandavágs Sangkóri.

Eisini minnist Elin Johannesen aftur á farna tíð bæði í arbeiði sínum og í samfelagnum sum heild, og vísir á, hvussu stór broytingin hevur verið.

Í Minnisbrotum um abba sigur Osmundur Joensen okkum frá ymsum tilburðum um abba sín Peter Jacob Petersen í Sørvági.

Eisini er grein við endurminningum eftir Gudruna Zachariasen. Gudrun var gift við Jógvani Zachariasen, lækna, ættaður av Kirkju. Tilburðirnir í hesi grein fara fram undir og eftir fyrra heimsbardaga.

### 25 ár sum ritstjóri

Tað gekk tó betur enn væntað og Jólaboð er komið út á hvørjum ári síðani, sum ein trúføst áminning um, at jólahøgtíðin er í hondum. Seinnu árini er ritið komið út í ikki færri enn 3000 eintøkum. Ein av eldsálunum aftanfyri útgávuna er Guttorm Zachariassen, sum fyrr í ár kundi halda 25 ára starvsdag sum ritstjóri á Jólaboð. Enn hevur hann ikki ætlanir um at gevast, í øllum førum ikki so leingi, sum hinir hjálpa, sigur Guttorm, sum saman við Svenning Tausen og Theodor Hansen rekur Bókadeild KFUMs.

Fyrsta útgávan hjá forlagnum var søgusavnið Í Harrans hondum eftir Jóhan Nielsen, prest, sum kom út í 1985. KFUM byrjaði tó longu at geva út bøkur í 1959, tá fyrsta bindið av Lívsmyndir eftir Christian Høj kom út. Av øðrum bókum kunnu nevnast andaktsbókin, Hvílið tykkum eitt sindur eisini eftir Christian Høj, Leiðir Harrans við søgum, sum Katrin Joensen týddi og Av Stórugrynnu til Jorsalar, ið er savn av søgum úr eldri útgávum av Jólaboð.

### Robinson Krusoe

Í hesum døgum roynir Bókadeild KFUMs seg við eini heldur øðrvísi útgávu. Tað er bókin Robinson Krusoe eftir Joachim H. Campe, sum Theodor Hansen hevur týtt til føroyskt. Bókin byggir á heimskendu søguna hjá Daniel Defoe um Robinson Krusoe og Fríggjadag og teirra upplivingar á oydnu oynni. Campe hevur skrivað nógvar bøkur, serliga barnabøkur, sum altíð eru bæði upplýsandi og samstundis stuttligar hjá børnum at lesa.

# Lítið forlag við stórum limaskara

**Tey flestu munnu kenna kristiliga tíðarritið Leirkerið. Aftanfyri stendur forlagið av sama navnið, sum júst hevur givið út stóra myndabíbliu fyri børn**

LEIRKERIÐ

Lítla forlagið Leirkerið í Gøtu hevur nú heili 20 ár á baki. Hóast útgávurnar ikki eri so nógvar um árið, munnu flestu føroyingar kenna bæði tíðarritið Leirkerið og onkra av bókunum, teir báðir ritstjórarnir Zacharias Zachariassen og Flóvin Tyril hava greitt úr hondum hesi árini.

### 600 limir

Nýggjasta útgávan hjá Leirkerðinum er Myndabíblian, sum Erla Berghamar hevur týtt úr enskum. Bókin er ætlað børnum í 1-10 ára aldri, og í henni eru søgur úr gamla og nýggja Testamenti við spurningum til. Eisini hevur forlagið júst endurprentað eina av



sínum best umtóktu bókum, nevniliga Dagsins Orð eftir Svenning Tausen, sum kom kom út fyrstu ferð í 1999 men hevur verið útseld í tvey ár.

Av stóru bókunum, sum forlagið hevur givið út hesi árini, kunnu nevnast bókin um Edvard í Svínoy og Bíblian á føroyskum í hálva øld, sum Zacharias Zachariassen hevur skrivað.

Bøkurnar hjá Leirkerinum eru at fáa í bókabúðunum, men verða annars sendar teimum meir enn 600 limunum í bókaringinum hjá forlagnum, so skjótt tær eru komnar út. Soleiðis verður tryggjað, at forlagið fær fyri útreiðslurnar innan stutta tíð, og tí kann fara undir næstu útgávu. Endamálið hjá forlagnum er at breiða tann kristna boðskapin til børn og vaksin við bæði evangeliskum, lærandi og uppbyggjandi lesnaði.

ave